# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politisk atsókn móti landsstýrismanni

Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, hevur hvassiliga at landsstýrismanninum, Hans Paula Strøm, ið hevur ábyrgd av sjúkrahúsverkinum. Funnist verður at Hans Paula fyri ikki at hava ruddað upp á Landssjúkrahúsinum og álvarsamt spurnartekin verður sett við førleika landsstýrismansins at røkja sítt politiska starv. Talan er um eitt óvanligt stig frá samgongufelaga. Víst er samgonguklandur einki óvanligt. Men hetta álop er út um tað vanliga í og við, at landsstýrismaðurin verður politiskt ábyrgdaður fyri støðu á einum almennum stovni, soleiðis, sum henda støða er lýst í Dimmalætting. Hetta merkir fyri tað fyrsta, at Jenis uttan víðari hevur góðtikið allar atfinningar hjá blaðnum og ta mynd blaðið gevur av Landssjúkrahúsinum. Hetta merkir í øðrum lagi, at hann ger politiska ábyrgd galdandi, nakað ið bert kann merkja, at Jenis vil hava landsstýrismannin frá.

Landsstýrismaðurin sjálvur svarar hvassliga aftur í her blaðnum í dag. Hann skírir skriving Dimmalættingar sum skaðiliga forfylging av okkara týdningarmesta heilsustovni – sum ein tvey ára skipað, áhaldandi og miðvís herferð móti Landssjúkrahúsinum. Hann leggur afturat, at hann tekur misálitið frá Jensi í størsta álvara og fer at viðgera hetta á røttum staði. Vit fara ikki her djúpari inn í málið um herferðina móti Landssjúkrahúsinum, hetta evnið viðgjørdu vit í gjár. Hinvegin loyva vit okkum at staðfesta, at tað er í tøkum tíma, at landsstýrismaðurin meldar út í hesum máli. Í øðrum lagi kann staðfestast, at samgongan hevur fingið enn ein álvarsaman samstarvstrupulleika. Hetta merkir so aftur, at fyrst og fremst løgmaður hevur fingið enn ein politiskan trupulleika av samgonguni at dragast við. Fyri hvørja ferð samgongulimur ber seg at sum í hesum føri Jenis, minkar áltið á sitandi samgongu millum manna. Her skal vaskast upp og niður, um ikki alt álit skal vera fokið áðrenn langt um líður. Lat okkum í hesum sambandi nevna, at tað er ikki landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum vit hava í huga her. Hann hevur gjørt eitt gott arbeiði undir truplum umstøðum, og tað má sigast at vera heldur enn ikki løgið, at formaður Miðfloksins nýtir høvið at stinga landsstýrismanninum skør, heldur enn jaliga at medvirka til at finna haldgóðar loysnir. Løgmaður kann ikki loyva sær at sita hendur í favn, meðan formaður í samgonguflokki máar støðið undan landsstýrismanni í uriasstarvi. Løgmaður eigur at hava í huga, at eftir politisku atsóknina móti landsstýrismanninum situr almenningurin enn einaferð eftir við myndini av eini samgongu í djúpum spliti. Her er talan um eitt so álvarsamt mál, at spurningurin er, um ikki løgmaður skal nýta hetta til Ólavsøku at umhugsa aðrar samgongumøguleikar. Hann eigur at hugsa um, at samfelagið, sum støðan er, illa tolir eina samgongu í áhaldandi klandri.

**Sosialurin**

## Jenis Like a Puppet on a String

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum



**Miðflokkaførarin sum handskadukka hjá Dimmalætting í jagstranini av Landssjúkrahúsinum**

Tað var tann yndisliga Sandie Shaw sum í mínum ungdómsárum í 1967 bergtók okkum øll við poppsanginum “Like a Puppet on a String” (finn hann á Google og hoyr hann har á YouTube).

Hetta var tað fyrsta eg kom í tankar um, tá eg sá hevndarálopið móti mær frá Dimmalætting í gjárkvøldið. Jenis á Rana, formaðurin í Miðflokkinum, sum handskadukka hjá Brynhild Thomsen og Árna Gregersen.

**Ongin kann gera sær minstu vónir um at kritisera Dimmalætting óstraffaður**

Men onkuntíð vil man álíkavæl ikki finna seg í hesi journalistisku valdsnýtsluni. At eg fór at fáa tað aftur í gráum kálvskinni, tá eg talaði at herferðini hjá Dimmu móti Landssjúkrahúsinum, tað visti eg frammanundan. Álíkavæl gjørdi eg av, ikki at bakka fyri heksajaktini hjá Dimmalætting, men heldur at siga mína erligu meining um ta journalistisku inkompetansuna hjá Dimmalætting í teirra skaðiligu forfylging av okkara týdningarmesta heilsustovni av øllum - sum ein tvey ára skipað, áhaldandi og miðvís herferð móti Landssjúkrahúsinum.

**Jenis sum handskadukka hjá Brynhild og Árna**

Tó tey eru smart. Sjálvandi fer Dimmalætting ikki at gera tað skitna arbeiði sjálv. Tað fær man sær ein hentan idiot at gera. Og hvør er nærri enn sjálvur Miðflokkaførarin, Jenis av Rana, sum øllum kunnugt man vera ein av ídnastu álopsmonnunum móti Landssjúkrahúsinum og øllum leiðslum tess tey nógvu seinastu árini?

Blaðleiðsluni á Dimmalætting vil eg heilsa og biðja tey taka tað í álvara, sum Harry Gudmundsson, skurðlækni á Landssjúkrahúsinum, skrivaði í opnum brævi til teirra í gjárkvøldið í Sosialinum (nú eitt samdøgur seinni havi eg ikki enn sæð tað í Dimmu).

Til samgonguflokkin Miðflokkin vil eg siga, at eg taki tað sum eitt álvarsmál, at formaðurin í flokkinum ikki hevur álit á mær sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum. Tað fari eg tó ikki at viðgera í fjølmiðlunum, men á røttum stað.

**Fyri at testa trúðvirði hjá Dimmu:**

Hví gera tit ikki eina samrøðu við yvirlæknan á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum, Harri Guðmundsson, um hann er samdur við tykkum í tykkara kolldøming av trygdini fyri lív og heilsu hjá sjúklingunum á Landssjúkrahúsinum?

Hví gera tit ikki eina samrøðu við okkara hægsta heilsufakliga myndugleika, Høgna Debes Joensen, landslækna, um hann er samdur við tykkara kolldøming av leiðslu og fyriskipan av heilsufakliga virkseminum á Landssjúkrahúsinum?

## Nær hevur Landsstýrið avgjørt at broyta kós í EFTA málinum?

**JOHAN DAHL**
løgtingsmaður



Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita frá samgongulimum, nær avgerðin at skifta kós í EFTA málinum og leggja seg á ES bógvin, er avtalað? Ein so stór og avgerandi vend má óivað hava fingið drúgva politiska viðgerð í samgonguni, ella hvat?

Stutt eftir at Edmund Joensen, fólkatings- og løgtingsmaður heitti á løgmann um at seta ES á dagsskránna fyri ríkisfundin, var landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum í kringvarpinum og kunngjørdi at nú hevði landsstýri lagt á annan bógv viðv. EFTA málinum.

Við hesum úttalilsum/proklamatión frá Høgna Hoydal landsstýrismanni í uttanlandsmálum, man endaligi seymurin vera sligin í EFTA kistuna.

Orsøkin til at einki yvirhøvur hevur verið at frætt um hvussu sjarmuoffensivin hjá uttalandsmála landsstýrismanninum hevur gingist í sambandi við EFTA limaskap, man ivaleyst verða at finna í hesi útmelding.

Eitt vónbrot frá enda í annan hava royndirnar verið at umvenda Sveis, Noreg, Lichtenstein og onnur um føroyskan EFTA limaskap, og harvið má “erkendelsens time”verða komin bæði hjá landsstýrismanninum og løgmanni og verður skjútsið tí nú vent móti ES – ella rættari móti loysnum sum eru mest gagnligar at fáa við ES - uttan ES limaskap, sum landsstýrismaðurin málber seg.

Ikki sørt kryptiskt má sigast.

Høgni Hoydal kunnger í kringvarpinum at nú skal hann hava hjálp frá Bretlandi, Norðurlondum og Baltisku londunum at náa sínum máli. Eg má siga at sera ilt er at fáa eygað á nakran logikk í hesum vavgreytatosi hjá Høgna.

Vóni at Høgni kann svarað mær:

Hvat er tað sum hesi lond kunnu opna av hurðum sum danska stjórnin ikki er før fyri? - Svøríki, Finnland, Estland, Lettland og Litava og Bretland eru øll ES limalond sum kunnugt.

Hvat er tað fyri serlig viðurskifti og serskipaninir hesi lond hava sum ger júst teirra hjálpandi hond so umráðandi?

Hvat er tað sum tú vil uppnáa heilt ítøkiligt?

Hví tekur tú ikki allarfyrst fund við donsku stjórnina og biður teir um vegleiðing og eina hjálpandi hond at náa tí máli sum tú ætlar??

Kanst tú kunna okkum – fólkið í Føroyum, hvat tað er tú ætlar í ES høpi og ES samstarvi?

Trupult er at fáa eyga á hvat tað veruliga er sum samgongan ætlar – eisini í hesum málinum.

Tað sýnist fyri mær og ivaleyst flestu føroyingum sum um Landsstýrið við Høgna Hoydal á odda, vevur sum hundur um heita greyt fyri at finna bestu fintuna at sleppa uttanum samstarv og eina hjálpandi hond frá donsku stjórnini, til at finna bestu loysnirnar fyri Føroyar, - tað verið seg innanfyri ella uttanfyri ES.

Tað er stórt spell, tí júst har fæst neyðuga ráðgevingin og politiska hjálpin til at koma í tættari samstarv við ES og møguligum ES limaskapið við undantøkum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.